Skrivligur fyrispurningur
eftir § 52a í Tingskipanini

Spyrjari: Beinta Løwe Jacobsen, løgtingsmaður

Svarari: Uni Rasmussen, landsstýrismaður í samferðslumálum

Evni: Asfaltering og annað í Kalsoynni

Spurningar:

1. Nær er ætlanin at asfaltera landsvegirnar og vegirnar í tunlunum í Kalsoynni?
2. Hvørjar ætlanir eru um at bøta um viðurskiftini hjá ferðafólkum, sum bíða á keiini á Syðradali?
3. Nær er ætlanin at byggja bíðirúm við vesihentleikum og øðrum á keiini á Syðradali?

Viðmerkingar:
Kalsoyggin er millum mest vitjaðu oyggjar í landinum. Sambært hagtølum hjá SSL eru omanfyri 20.000 fólk og meira enn 3.000 bilar farin um Kalsoyarfjørð fyrstu fýra mánaðirnar í ár. Hetta eru fimm túsund ferðafólk fleiri enn somu tíð í fjør. Nógva ferðslan slítur vegirnar, og tað sæst aftur, tí nógva staðni eru teir illa farnir. Tí mugu vegirnir asfalterast.
Umstøðurnar hjá ferðafólkum, sum bíða, eru heldur ikki tær bestu, um veðrið er vánaligt. Løgtingið feldi uppskotið hjá undirritaðu um at bøta um hesi viðurskifti. Klaksvíkar kommuna hevur sett tvey vesi upp á havnarlagnum, men sambært fjølmiðlum eru hesi nú tikin burtur, tí tey skuldu brúkast aðrastaðni. Tí má tað almenna nú gera okkurt fyri at bøta um hesi viðurskifti.

Á Løgtingi, 10. juni 2022

Beinta Løwe Jacobsen